# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*»Ávaring: Ein virus er farin at ganga Symptomir: Gott lag, róp og undirhald. Útbrot tann 17-03-2007«*
*www.ab.fo*

VB-Neistin 16-16 (11-10):

# VB fekk finaluplássið



*Enn einaferð gekk javnt á, men við regluni um fletsu mál á útivølli megnaði VB at vinna seg í FM-finaluna móti Stjørnuni*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

**VB og Neistin spældu enn ein javnleik í seinnu hálvfinaluni í Sunset kappingini. Við javnleikinum skal VB møta Stjørnuna í finaluni, tí tær hava skotið flest mál á útivølli ímóti Neistanum í báðum hálvfinalunum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyrri hálvfinaludysturin í Sunset kappingini millum VB og Neistan var endaður við javnleiki 26-26 í høllini á Hálsi, og tí var lagt upp til ein sera spennandi dyst, tá liðini møttust í Vági í seinnu hálvfinaluni, tí her var als einki avgjørt.

Dysturin byrjaði eisini dramatiskt má sigast. Ella tað var kanska ikki júst dysturin, men meir umstøðurnar kring sjálvan dystin, sum vóru heldur keðiligar sunnumorgunin. Veðrið var av tí keðiligasta um suðuroyarfjørð, og tí hevði Smyril valt at steðga siglingini sunnumorgunin. Hetta gjørdi, at eingin dómari kundi koma suður, men í evstu løtu blivu dómararnir tó sendir suður við eini tyrlu hjá Atlantsflog, soleiðis at dysturin kundi spælast.

## VB var omaná

Høllin í Vági var mest sum stúgvandi full, tá dysturin bleiv bríksladur í gongd millum VB og Neistan, men tað vóru so at siga bert vágbingar í høllini, tí neistaviðhaldsfólkini sluppu ikki um suðuroyarfjørð orsaka av ringa veðrinum.

Fyrstu løtuna av dystinum var líkt til, at hann kundi blíva rættiliga spennandi. Her var at kalla eingin munur á liðunum, og tá annað skoraði, svaraði hitt skjótt aftur. Liðini tóktust eisini vera rættiliga varin í dystinum, og tað var týðiligt, at bæði løgdu stóran dent á verjupartin. Hetta gjørdi eisini, at dysturin ikki var serliga málríkur, men tað, sum manglaði í málum, fingu áskoðararnir so sanniliga í spenningi.

Um miðjan fyrra hálvleik tók VB eitt ordans hál. Fyrst fingu tær trý mál á rað, og løgdu seg harvið á odda við tveimum málum. Tá Neistin so fekk minka um munin einaferð, skoraði VB enn einaferð tríggjar ferðir á rað, so nú var heimaliðið brádliga á odda við fýra málum.

Móti endanum av hálvleikinum svaraði Neistin tó aftur. Nú koyrdi verjan hjá teimum avbera væl, og í hinum endanum fingu tær eisini okkurt málið, so tá liðini fóru til hálvleik, førdi VB bert við einum máli.

## Verjurnar tóku yvir

Í seinna hálvleiki var tað verjurnar, sum settu dagsskránna. Bæði liðini høvdu stórar trupulleikar at skora í álopinum, men tað vóru tó gestirnir úr Havnini, sum fingu betru byrjanina uppá hálvleikin. Tær fingu trý mál fyrstu 10 minuttirnar, og hetta gjørdi, at tær brádliga førdu við tveimum málum.

Hesa løtuna hevði VB ovurhonds stórar trupulleikar at fáa bóltin í málið, og tað gingu heili 10 minuttir, áðrenn VB fekk sítt fyrsta mál eftir steðgin. VB megnaði tó at kempa seg uppaftur á javnleik 13-13, tá ið annar hálvleikur var hálvrunnin, og nú stóð mest sum í stað í eina løtu.

Bæði liðini høvdu framvegis trupulleikar við at skora, men innímillum kom okkurt hendinga mál síðsta korerið.

Ta fýra minuttir vóru eftir at spæla, legði VB seg á odda við einum máli, og nú sá ikki gott út hjá Neistanum. Tær megnaðu at javna tá á leið tveir minuttir vóru eftir, men hetta gjørdist eisini síðsta málið í dystinum, sum endaði við javnleiki 16-16.

Við janvleikinum var tað VB, sum kom víðari, tí at tær høvdu skotið fleiri´mál á útivølli. Neistin má hinvegin lata seg noyða við bronsuheiðursmerkini. Sjálvt um tær ongan dyst hava tapt fyri VB í ár, so er tað allíkavæl VB, sum skal møta Stjørnuni í finaluni.

## FAKTA

**VB-Neistin 16-16 (11-10)**
**Málskjúttar:**
**VB:** Daiva Tuomaite 5 (3), Gurið Mortensen 5, Maja Sølvsten 3, Laila Jespersen 1, Margreth Augustinussen 1, Teresa Joensen 1
**Neistin:** Nicoleta R. Hansen 6 (4), Unn Kragesten 3, Rakul Augustinussen 3, Katja Eigemann 2 (1), Ása D. á Neystabø 1, Heidi Maria Akselsen 1
**Brotskøst:** VB 3, Neistin 7
**Útvísingar:** VB 6, Neistin 4
**Dómarar:** Rúni Mohr & Heri Petersen

Stjørnan-StÍF 30-15 (14-5)

# Enn ein stórsigur

**Stjørnan vann eisini tryggan sigur í seinnu hálvfinaluni ímóti StÍF í Sunset kappingini, og sostatt eru tær klárar til finaluna í bestu kvinnudeildini**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tað var longu greitt eftir seinna hálvfinaludystin millum Stjørnuna og StÍF, at Stjørnan helst fór at koma víðari. Tær vunnu nevniliga sannførandi í fyrra dystinum á Skála, so spenningurin var ikki tann heilt stóri undan seinnu hálvfinaluni.

Stjørnan avgjørdi tó dystin mest sum alt fyri eitt. Tær komu nevniliga á odda 6-0, og StÍF fekk ikki sítt fyrsta mál í dystinum, fyrrenn 20 minuttir vóru farnir, so hetta fór ikki at gerast lætt hjá teimum. Í steðginum hevði Stjørnan vunnið seg heli níggju mál fram um, og her týddi okkurt uppá stórsigur.

Eftir steðgin kom StÍF heldur betri við, og nú skoraðu tær eisini fleiri mál. Allíkavæl var tað Stjørnan, sum bleiv við at økja um munin. Sjálvt um tær manglaðu Alinu, so tóktist hetta ikki at nerva tær nakað sum helst, og at enda vunnu tær við heili 15 málum í seinnu hálvfinaluni. Við sigrinum eru tær klárar at møta VB í finaluni.

## FAKTA

**Stjørnan-StÍF 30-15 (14-5)**
**Málskjúttar:**
**Stjørnan:** Simona Petersen 8 (1), Anna Kristina Samson 4, Durita Christophersen 4, Maria við Neyst 4, Durita Mikkelsen 3, Joan M. Djordjevic 3, Shari Mikkelsen 2, Bára S. Klakkstein 2
**StÍF:** Rósa Johansen 5, Rebekka Justinussen 3 (1), Fríðrun Danielsen 3, Jóhanna í Króki 2 (1), Bára B. Danielsen 1, Bára Bertelsen 1 (1)
**Brostkøst:** Stjørnan 1, StÍF 5
**Útvísingar:** Stjørnan 1, StÍF 3
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kristjan Johansen